# Lesiætlan og royndir

MusikkskúlaMiðnám

*Rytmisk deild*

***Sangur***

## Upptøkuroynd

**Tónleikaverk**:

Umsøkjarin framførir tvey stykkir við ymiskum huglagi.
Minst annað stykkið skal framførast í samanspæli.
Í minst øðrum av stykkjunum skal umsøkjarin improvisera/parafrasera.

Viðm.: Umsøkjarin útvegar fylgispælara og samanspælsbólk

**Prima vista – secunda vista:**

a) Prima vista roynd í nóta- og rytmulesing

**Fyrisøgn:**

1. Endurgeva (syngja) stutt løg og imitera klappaðar rytmur

Viðm.: **Vegleiðing til royndina**

1. Hugsa tær royndina sum eina musikalska heild – eina konsert – har sensorarnir eru áhoyrararnir
2. Ger tað, sum tú dugir best innan karmar, sum tú kennir teg heima í.
3. Onki er frammanundan fastlagt hvat stílslag ella hvønn tónleikaform innan rytmiskan tónleik tú skalt velja til royndina
4. Vel eitt torleikastøði, sum ikki órógvar musikalska úrslitið
5. Hugsa fjølbroytni viðvíkjandi tempo og rytmiskum eyðkenni

## Lesiætlan

**Endamál:**

1. at menna og styrkja teknisku og musikalsku førleikar næmingsins so teir røkka einum støði, sum svarar til upptøkukrøvini til konservatorium.
2. at menna grundleggjandi førleikar næmingsins sum solistur og ensembletónleikari
3. at næmingurin verður førur fyri at luttaka og kennir seg heima í so breiðum parti av rytmisku tónleikamentanini sum gjørligt bæði viðvíkjandi stíli og genru.

**Innihald:**

Við einum stílsligum fjølbroyttum og breiðum repertoire verður arbeitt við at menna førleikar næmingsins á økjum sum t.d.

1. musikalskur framburður
2. improvisatión
3. imitatión
4. teknikkur (fimi)
5. klangskapan og -menning
6. motorikkur og koordinatión
7. nótalesing